## Blaðgrein gav úrslit

Feløg, sum reka ferðavinnu, royna ofta at fáa góða umrøðu í útlendskum fjølmiðlum, tí tað kann vekja ans millum ferðahugaðar lesarar. Tí var norska strandfarareiðaríið Hurtigruten fegið, tá ein blaðkvinna hjá stóra amerikanska blaðnum Los Angeles Times beyð sær til at skriva eina frásøgn um farleiðina úr Bergen norður til Kirkenes. Úrslitið kom eisini, tí nú hevur reiðaríið fingið 30 prosent fleiri bíleggingar, harav nógvar úr USA.

## Lort í býin

Ein amerikonsk familja krevur 1,5 millión í endurgjaldi frá Greyhound bussfelagnum, eftir at tey komu lort í býin, tá ein Greyhound bussur tømdi vesið niður í bil teirra. Robert og Angela Stokes og børn teirra, ið eru 9, 10 og 22 koyrdu aftan fyri ein Greyhound buss á einum landavegi, tá eitt starvsfólk í bussinum av órannsakiligum orsøkum tømdi vesið á bussinum út í gjøgnum dyrnar á koyrandi bussinum, alt innihaldið í vesinum lortur, land og vesipapír fór beint inn gjøgnum opnu bilvindeyguni hjá familjuni, skrivar Ekstrabladet.

- Familjan hevur sambært sakførara sínum verið hjá lækna fleiri ferðir, fyri at kanna um tey eru vorðin sjúk av hendingini. Eisini vóru tey noydd at skifta alt innbúgvið í bilinum út.

**nud**

Neyðhjálp Fólkakirkjunar:

# Letur upp endurnýtsluhandil í Havn

TÍÐINDASKRIV

Í morgin, hósdagin 16. novembur kl 15 letur ”Iktys” upp í N. Winthersgøtu 9 (gamla ”Køkubúðin”) í Tórshavn. Hettar er ein nýggjur og øðrvísi handil, rikin av sjálvboðnum frá Neyðhjálp Fólkakirkjunar. Til upplatanina hava nakrir kendir føroyingar latið teirra brúktu klæði e.a. til handilin.

Aftan á stórt og gott arbeiði eru sjálvboðin frá Neyðhjálp Fólkakirkjunar til reiðar at lata upp endurnýtsluhandil í Tórshavn. Í Danmark hevur Neyðhjálp Fólkakirkjunar havt so stóra eydnu við at reka endurnýtsluhandlar, at man nú hevur gjørt av at lata ein upp her.

Handilin í N. Winthersgøtu 9 er innrættaður við hjálp frá starvsfólki og sjálvboðnum frá Neyðhjálp Fólkakirkjunar. Harumframt hevur ein av okkara ungu skraddarum/sniðgevum, Marita Samson Sigurdardóttir, saman við øðrum góðum fólki, hjálpt okkum at prýða hølini. Eina stóra tøkk til Maritu og aðrar hjálpandi hendur, fyri tað stóra arbeiðið í samband við at byggja upp og fríðka um handilin.

- Í samband við at latið verður upp, hava vit heitt á nakrar kendar føroyingar um at rudda goymslur sínar og lata ”Iktys” ein av teirra kærastu lutum. Teirra millum eru borgarstjórin, sum gevur okkurt forkunnugt og fer at siga nøkur orð um hettar, tá hann letur upp handilin fyri okkum. Og kendi sniðgevin Marianna Mørkøre sum hevur gjørt av at lata okkum ein av vøkru kjólunum frá seinasta verki teirra, sigur Neyðhjálp Fólkakirkjunnar í tíðindaskrivi.

Upplatingarrøðan verður á degnum hildin av Kirsten Lund Larsen ið er formaður Neyðhjálp Fólkakirkjunar.

- Vit í Neyðhjálp Fólkakirkjunar eru sera errin av at sjálvboðin nú lata upp ein endurnýtsluhandil í Tórshavn. Hjá Neyðhjálp Fólkakirkjunar hava vit langa og góða siðvenju í at útvega og geva gávur frá fólki til heimsins fátækstu. Við einum endurnýtsluhandli eru nú gróðrarlýkindi fyri at sjálvboðin eisini kunna geva tíð til arbeiðið ið Neyðhjálp Fólkakirkjunar ger og á tann hátt tryggja heimsins fátækstu betri kor, sigur aðalskrivarin í Neyðhjálp Fólkakirkjunar.

Tó ber bert til at reka ein sovorðnan handil, um góð fólk vilja lata okkum vøru at selja. At byrja við mest klæði og prýðislutir, men eisini smærri skreytlutir, so sum vasar, ljósastakar og tílíkt, hevur áhuga.

– Tí byrja vit longu fríggjadagin 17. november í vanligari upplatingartíð frá kl.13 til 17.30, at taka ímóti. Bert biða vit um at vøran er heil og rein. Eisini eru allar sjálvboðnar hjálpandi hendur so hjartaliga vælkomnar, verður sagt í tíðindaskrivinum.






*Óli Nielsen í handlinum hjá Neyðhjálp Fólkakirkjunnar, sum húsast í gomlu Køkubúðini í Havn*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

# Týskar týðingar av føroyskum søgum

BÓKAFRAMLØGA

*Kim Simonsen*

Almenn bókarframløga var í Norðurlandahúsinum hóskvøldið 9. november kl. 19.30. Tá var søgusavnið við føroyskum týðingum til týskt ”Von Inseln weiß ich - Geschichten von den Färöern”, sum tað sveisiska forlagið Unionsverlag hevur latið geva út, lagt fram.

Bókin var løgd fram á almennari samkomu. Tað eru granskarnir í norðurlenskum Verena Stössinger og Anna Katharina Dömling, ið hava skipað og ritstjórnað útgávuni. Tær tosaðu hetta kvøldið um hvussu henda bókin er íkomin og løgd til rættis.

### Ein antologi

”Von Inseln weiß ich - Geschichten von den Färöern”, er ein antologi við týddum stuttsøgum og stuttprosa. Hon er 381 síður long.

Inngangur er eftir William Heinesen kallaður ”Nasse Heimat” (Våd hjemstavn), sum í føroyskari týðing eftir Heðin Brú eitur ”Vátt heimbýli”.

Við eru síðani síðan 27 søgur og aðrir stutttekstir. Hesir eru sum heild skipaðir í tíðarrøð ella í evnisligum samanhangi.

Fyrstu søgurnar er søgnin um Beintu, kalla ”Die Sage von Beinta und Peder Arrheboe” (Beintu og Peder Arrheboe), sum dr. Jakob Jakobsen hevur skrivað upp. Søgur eru eftir Regin í Líð,

Andreu Reinert (Andreu í Norðradali). Her er søgan ”Abal” (Ábal) eftir Sverra Patursson,

»Bekka« (Bekka) eftir Petru Djurhuus. Søgur eftir Martin Joensen og óføra stuttsøgan

”Don Juan fra Tranhuset” eftir William Heinesen. Her eru brot úr skaldsøguni hjá Kristian Osvald Viderø. Søgur eftir Eilif Mortansson, Heðin Brú, Jens Paula Heinesen, Steinbjørn B. Jacobsen, Karsten Hoydal og søgan ”Liebeskummer” (Hjartasorg) eftir Gunnar Hoydal og ”Weit weg und blass” (Fjarur og følin) eftir Gunnar Hoydal. Oddvør Johansen, Hanus Kamban, Ebbu Hentze,

Lydia Didriksen, Jóanes Nielsen, Carl Jóhan Jensen eru við. Eisini er stuttprosa og søgur við eftir

Tórodd Poulsen (Reglur), Rakel Helmsdal, Elias Askham, og Marjuna Kjelnæs.

Verena Stössinger og Anna Katharina Dömling, sum standa fyri útgávuni, hava eisini skrivað eitt fródligt »Nachwort« (ein eftirmála), har sum lesararnir fáa at vita um Føroyar, um land og fólk, um føroyskan skaldskap og bókmentir, søguligа sæð, ein yvirlitsgrein v.ø.o.

Tað eru nógvir týðarar, so sum Renke Borchert, Kirsten Brix, Ernst Krenn, Inga Meincke, Gisela Perlet, Birgit Remmel og Detlev Wildraut.

Hetta var hugnaligt kvøld, har Verena Stössinger og Anna Katharina Dömling løgdu

»Von Inseln weiß ich ...« fram.

Gunnar Hoydal og Malan Marnersdóttir fara eisini at siga nøkur orð um útgávuna og um týðing. Serliga komu tey inná, at tað er bæði gleðiligt at ein slík bók kemur, og syrgeligt, at vit ikki hava ein ella annan útgávupolitikk, har vit sjálvi kunnu standa fyri slíkum útgávum.